## Viðmerking

# Hetta tíma vit ikki at standa modell til

*–Vit hava ferð eftir ferð lagt merki til, at okkara arbeiði er til onga nyttu, og vit tíma ikki at spilla tíðna uppá mál, har landsstýrismaðurin frammanundan lætst at vita betri, sigur Óli Jacobsen, formaður í fiskimannafelagnum um orsøkina til, at umboðini hjá vinnuni í Skipanaranevndini hava tikið seg úr nevndini.*

Fyri nøkrum fáum døgum síðani boðaðu tey fýra umboðini, sum vinnan hevur valt í Skipanarnevndina, at tey taka seg burturúr nevndini.

Orsøkin til tað, at tey halda, at tað er burtuspilt at brúka tíð og orku uppá eitt arbeiðið, sum als onki verður virt.

Í hesi frágreiðingini, sum eisini er prenta í tí nýggja FF blaðnum, sum kom á gøtuna í gjárkvøldið, greiðir Óli Jacobsen. formaður í Fiskimannafelagnum frá, hví tey fýra vinnuligi umboðini í skipanarnevndini, hann sjálvur, Jónsvein Knudsen, Auðunn Konraðsson og Árni M.Dam, hava sagt seg úr nevndini.

Óli Jacobsen sigur m.a. at vit mugu ikki gloyma, at Fiskidagaskipanin júst er ein *skipan*.

– Í tí árliga afturvendandi tjakinum um fiskidagarnar kann vera vert at minna um, at fiskidagaskipanin er ein »skipan«, sum hevur nakrar ásettar fortreytir.

Forsøgan er tann, at vit í 1994 fingu eina kvotaskipan, sum skjótt vísti seg at vera óbrúkilig. Tískil varð sett ein nevnd við umboð úr vinnuni, almennu umsitingini og Fiskirannsóknarstovuni, sum fekk til uppgávu at koma við uppskoti um eina reguleringsskipan, sum ikki gekk út frá metingum av fiskastovnunum, men sum gekk út frá tí fiski sum veruliga var til staðar í sjónum. Og tað var júst tað sum var eyðkennið við fiskidagaskipanini, og hetta fekk vinnunevndin hjá løgtinginum, har Jørgen Niclasen eisini var formaður, váttað frá Hjalta í Jákupsstovu, tá skipanin var til viðgerðar har.

Hetta merkir, at fiskidagaskipanin í sínum útgangsstøði gevur rætt veiðutrýst. Er meira at fáa enn roknað er við er tað tí, at stovnurin er betri fyri enn »normalt« og tað mótsatta er galdandi um tað øvugta hendir. Tískil er skipanin »sjálvregulerandi«.

Fyri at sleppa undan ivamálum um grundarlagið fyri skipanini vóru hesi nevndu prinsipp staðfest í frágreiðingini hjá nevndini fyrstu ferð í 1998, og er hent við góðkenning av umboð hjá landsstýrinum.

Tað sum tí er høvuðsuppgávan við eftirliti av skipanini er at kunna gera upp, um fortreytirnar fyri henni broytast. Fyrst og fremst at staðfesta um veiðutrýstið økist (ella minkar). Hendir hetta má dagatalið broytast tilsvarandi.

Hetta skuldi tískil verið ein skipan har vinnan kann vita, hvat hon hevur at halda seg til ár fram í tíðina, og at hon tískil kann sleppa undan teimum óvissum sum fyrst og fremst vóru við kvotaskipanini, men sum eisini kunnu vera við eini politiskari skipan, har landsstýrismenn skifta títt og har somu landsstýrismenn eisini kunnu skifta meining sum vindurin blæsir.

### Fiskirannsóknarstovan viðurkennir ikki skipanina

Og her tað at Fiskirannsóknarstovan kemur inn í myndina. Hóast hon upprunaliga góðkendi skipanina hava seinni royndir víst, at hon ikki viðurkennir hana og tær broytingar í arbeiðinum sum henda skipan má hava við sær. Og hetta er orsøkin til, at hon ikki vil taka undir við niðurstøðuni hjá eini annars samdari nevnd, sum hóast alt hevur ein viðurkendan fiskifrøðing sum formann.

Hetta kemur eisini til sjóndar í umrødda spurningi um at hava eftirlit við broytingum í veiðuorkuni. Tað sum verður gjørt ger FRS bert á sín hátt sum tænir hennara »nýfrelstu« støðutakan til skipanina.

M.a. vísa teir til eina spurnaðarkanning til skiparar á fiskiskipum, har ein av spurningunum ljóðaði soleiðis: »Verður fiskiskapurin skipaður øðrvísi, síðan fiskidagarnir komu. Túrarnir lagdir øðrvísi til rættis, meira lína sett, meira hædd tikin fyri veðurlíkindum osfr.«. Til hetta hava 148 skiparar og formenn av 168 svarað játtandi.

Men hetta er ein kanning sum als ikki kann nýtast vegna tann hátt sum spurningarnir eru formuleraðir. Og annars vegna ta samanblanding av ymiskum spurningum sum her er talan um, har tað kann svarast ja til onkran og nei til onkran annan.

Sum t.d. spurningurin um túrarnir verða lagdir øðrvísi til rættis. Sjálvsagt verða teir tað, men tað var eisini tikin hædd fyri tí í skipanini, tá hon var evnað til. Tað er nevniliga tikin hædd fyri, at fyrsti og síðsti dagur á einum túri nú fór at verða nýttur til fulnar, meðan tað fyrr ongan



*Hvør minnist ikki fyri tveimum árum síðani, tá ið John Petersen, sum tá var Landsstýrismaður í fiskivinnumálum, av Strøgnum í Keypmannahavn kunngjørdi, at fiskidagatalið skuldi skerjast 10%, áðrenn hann yvirhøvur hevði lisið frágreiðingina hjá Skipanarnevndina, spyr Óli Jacobsen. Hann sigur, at hetta er eitt dømi um, hvussu lágt í metum arbeiðið hjá Skipanarnevndini er*

týdning hevði um farið var avstað á kvøldi og tann dagurin taldi fult. Tað sum vildi havt áhuga fyri uppfylgingini hjá skipanarnevndini vildi verið ein staðfesting m.a. av um tað nú í einum 24 tímar verða settir fleiri húkar enn fyrr ella um trolini eru fleiri tímar á botni enn fyrr. Men slíkt tilfar hevur nevndin ikki fingið.

Annars hevði tað ikki verið av leið um FRS, tá hon nú tók tað annars skilagóða stig at gera eina spurnaðarkanning, ráðførdi seg við Skipanarnevndina um hvussu spurningarnir skuldu formulerast, tá stovnurin nú er umboðaður í nevndini. Men hetta er ikki hent.

Hetta er annars nóg mikið til spakuliga at máa grundarlagið undan eini annars idealari skipan. At hon er tað, verður júst í hesum døgum váttað úr Íslandi, har »syndarar« í hópatali nú stíga fram og »bekenna« hvussu tann skipanin elvir til útblaking av fiski í nøgdum sum fáa øll at øtast.

### Vinnuumboðini í skipanarnevndini tíma ikki meira

Vinnan var í Skipanarnevndini umboðað av fýra limum umboðandi stórt sæð allar tættir í veiðuni undir Føroyum. Hetta eru menn við nógvum royndum og stórari vitan innan síni øki. Hvørt ár er eitt stórt arbeiði lagt í at fáa eina so sakliga undirbygda frágreiðing sum yvirhøvur gjørligt. Hetta er sjálvsagt eisini galdandi fyri umboð fiskimanna í nevndini. Fiskimannafelagið hevur til eina og hvørja tíð kunnað útvega nevndini tilfar um støðuna í flotanum, sum hevur kunnað gagnað arbeiðinum hjá nevndini. Hetta er væl at merkja tilfar, sum tað skuldi verið uppgávan hjá almennum myndugleikum at útvega, men sum teir á ongan hátt eru førir fyri.

Hóast hetta merkir nevndin ferð eftir ferð, at hennara arbeiði er til onga nyttu. Hvør minnist ikki tá John Petersen av Strøgnum í Keypmannahavn fyri tveimum árum síðani boðaði Jørgen Niclasen frá skerjingum komandi fiskiár langt undan viðgerðini í Skipanarnevndini. Og at hetta var tilætlaður politikkur fekst váttað í vikuni, tá Jørgen alment boðaði frá eini nýggjari skerjing, áðrenn nýggja frágreiðingin yvirhøvur var kannað og viðgjørd í landsstýrinum.

Hetta tíma umboðini hjá vinnuni ikki at standa modell til. Tey hava ongan áhuga fyri at spilla sína tíð uppá viðgerð av málum, har landsstýrismaðurin uppá forhond letst at vita betur. Tí hava hesi umboð samtykt at taka seg burtur úr nevndini og hava sovæl fiskimálastýrið sum formaðurin í Skipanarnevndini fingið fráboðan um hetta stig.

### Jørgen nýtist ikki at undrast

Útvarpið fekk eina viðmerking frá Jørgen Niclasen til hesa støðu mikukvøldið og henda viðmerking kann bert styrkja vinnuumboðini í teirra avgerð. Men her skulu tó gerast nakrar viðmerkingar til sjónarmiðini hjá Jørgen.

### Hevur havt ríkiligt av høvum

Tá JN heldur at tað er ov lítið tosað saman, so er tað ikki tí at vinnan ikki hevur gjørt vart við seg. Sovæl í okkara seinastu ársfrágreiðing sum í FF-blaðnum, seinast enntá í seinasta blað, gjørdu vit vart við teirri óvissu og ótrygd sum lá í fráboðanini hjá landsstýrismanninum um skert dagatal komandi fiskiár. Og lurta teir ikki eftir FF so hevur Reiðarafelagið í síni ársfrágreiðing gjørt vart við seg. Sovæl í okkara seinastu ársfrágreiðing sum í FF blaðnum, seinast enntá í seinasta blað, gjørdu vit vart við teirri óvissu og ótrygd sum lá í fráboðanini hjá landsstýrismanninum um skert dagatal komandi fiskiár. Og lurta teir ikki eftir FF so hevur Reiðarafelagið í síni ársfrágreiðing gjørt vart við júst somu órógv. So Jørgen hevur havt ríkiligt av høvum at taka upp í samband við vinnuna, um hann heldur at hon hevur misskilt nakað sum helst. Men nú er tað ov seint!

### Lokkar við óvissum vinningi móti vissum tapi

JN heldur at niðurskurður í fiskidagatalinum er ein natúrlig fylgja av øktari umsetiligheit sum skal liggja í eini sokallaðari "pappírsleysari semju" í samgonguni, og sum enn mánaðar eftir at hon er gjørd er so pappírsleys, at eingin enn hevur kunnað sæð hana á einum pappíri. Men høvuðsinnihaldið sigst vera, at tað framyvir skal kunna vera møguligt at selja og keypa fiskidagar millum línuskip og partrolarar. Fyrst er ringt at síggja tað skilagóða í hesum, um vit ætla at varðveita ein fjølbroyttan flota. Síðan er ringt at síggja hvussu hetta skal kunna skaffa fleiri fiskidagar, tá fiskidagarnir verða fult troyttir í báðum hesum bólkum.

Men tað sum er tað avgerandi er, at tað er ringt at síggja, at tað skal kunna gagna vinnuni, at ein so óvissur "vinningur" skal latast við aðrari hondini meðan hin hondin uppá forhond og uppá dagin 1. september tekur henda vinningin inn aftur. Hetta er ikki tað sum vit onnur kalla stabilitet.

### Tekur arbeiðið úr hondini á skipanarnevndini

Eitt annað er so tað, at tað skuldi samb. arbeiðsbroytingum millum Skipanarnevndina og Fiskimálastýrið skuldi verið uppgávan hjá Skipanarnevndini at meta upp hvørt ein økt umsetiligheit merkir broyting í upprunaliga grundarlagnum fyri fiskidagaskipanini. Við síni grundgeving á hesum øki, nevniliga at Jørgen sjálvur skal taka hædd fyri hesum, hevur hann veruliga tikið eina av høvuðsuppgávunum úr hondunum á Skipanarnevndini. Hetta hevur hann sjálvsagt fulla heimild til. Men tað er í hvussu er vist, at henda uppgávan kann ikki liggja á tveimum støðum. Tó skal tilskilast, at við teimum royndum sum vinnan hevur av "speedinum" í Fiskimálastýrinum er neyvan grund til at halda at hetta arbeiði verður betri røkt har. Men annars er henda grundgevingin einsamøll nóg góð til hjá vinnuumboðunum at leggja frá sær.

### Skemtarin Jørgen: Lurtað verður eftir vinnuni annað hvørt ár!

Jørgen royndi at rógva uppundir, at vinnan hevði einki at klaga um tí gingið var eftir tilmælinum í fjør. T.v.s. at verður lurtað eftir henni annað hvørt ár, so má vinnan vera løgd. Hetta váttar tað sum vit vita, at Jørgen er ein rættuligur skemtari. Sum víst verður til fyrst í hesi grein er fiskidagaskipanin ein skipan, sum hevur ta fyritreyt at hon sleppur at virka eftir ávísum reglum, ikki annað hvørt ár, men hvørt ár. Hon skal geva vinnuni eina trygd fyri støðug viðurskifti. So t.d. teir sum í dag arbeiða við at leggja loyvi saman og fáa tað at bera til við verandi dagatal ikki annaðhvørt ár skulu liva í óvissu um at ein ella onnur pappírsleys semja tekur grundarlagið undan fortreytunum fyri hesi ætlan hjá vinnuni. Ein ætlan, sum annars er í samsvar við politikkin hjá landsstýrinum.

Hetta er stórt sæð tað, sum í fyrsta umfari kann sigast um hetta mál, men vit fara heilt givið at venda aftur til tað.



## SJÓNARMI‹

# Fiskivinnugransking í Føroyum

*Wefta rá›stevna hevur júst veri› í Tórshavn. Hesin felagskapur savnar granskarar úr ymiskum londum at umrá›a gransking serliga innan fiskiídna› og aling*

Framløgunar vóru umlei› 50 í tali og vóru bornar fram av granskarum úr Noregi, Ìslandi, Danmark, Finnlandi, Svøriki, T‡sklandi, Spania, Portugal, Hollandi, Englandi og USA. Hetta eru lond, sum í minni mun enn Føroyar eru bundin búskaparliga av fíggjarligu úrtøkuni úr fiski og alivinnuni

Føroyar vóru vertir fyri stevnuni. Sjálvt um Føroyar eru nógv meiri bundnar at fiski og alivinnuni enn omanfyri nevndu lond, var eingin sjálvstø›ug føroysk framløga.

Hetta er undarligt, havandi í huga tann t‡dning, sum fiski og alivinnan hevur fyri ta› føroyska samfelagi›.

Undirrita›i var so heppin at ver›a ein av føroysku luttakarunum á stevnuni.

Havi eftir loki› prógv sum fiskivinnufrø›ingur vi› lærda háskúlan í Tromsø, veri› virkin í meira enn 10 ár innan føroyska fiskivinnu, serliga á lei›slustø›i innan fiskiídna›in.

Eftir Wefta stevnuna helt eg ta› ver›a rætt at siga mína hugsan um fiskivinnugransking í Føroyum.

Hetta er so ein roynd at frambera míni sjónarmi›, um hvussu eg haldi fiskivinnugranskingin í Føroyum frægast kann skipast, útifrá teimum menniskjaligu og fíggjarligu karmum sum eru í tí føroyska samfelagnum.

### Hvat er gransking

Í hagfrø›iligum høpi n‡ta OECD londini hesar lei›reglur fyri at skilmarka (definera), hvat gransking er:

»Gransking kann skilmarkast sum skipa› skapandi arbei›i, fyri at økja um ta vísindaligu og teknisku vitanina og brúka hesa vitan til at vísa á verkliga n‡tslu«.

Skilt ver›ur vanliga ímillum tvey sløg av gransking:

- Grundgransking
- N‡tslugransking

Grundgransking er uppruna kanningar sum hevur til endamáls at fáa fram n‡ggja vísindaliga vitan og fatan. Hon er ikki beinlei›is rætta› ímóti verkligum málum ella n‡tslu.

N‡tslugransking er uppruna kanningar, har denturin ver›ur lagdur á at útvega n‡ggja vitan og fatan. Hon er beinlei›is rætta› móti verkligum málum ella n‡tslu.

Í samband vi› ta› ví›ari umrø›una um fiskivinnugransking í Føroyum, vil eg brúka or›i› vinnurætta› gransking í sta›in fyri n‡tslugransking.

### Er ney›ugt vi› fiskivinnugransking í Føroyum?

Eg haldi avgjørt, at ta› er ney›ugt vi› fiskivinnugransking í Føroyum.

Føroyska samfelagi› ver›ur bori› uppi av teimum inntøkum, sum fiskivinnan á sjógvi og landi skapar. Meir enn 90% av tí føroyska heildarútflutninginum kemur frá fiski og alivinnuni. Sjálvt um tali› av fólki, sum starvast í sjálvari vinnuni, ikki er so stórt, so er ta› avleidda virksemi› av fiski- og alivinnuni sera stórt.

Vit sóu í kreppuárunum, hvussu alt samfelagi› ávirka›ist av tí negativu gongdini í fiskivinnuni.

Vit síggja í dag, hvussu alt samfelagi› ávirkast av tí positivu gongdini í fiski- og alivinnuni.

Eitt samfelag, sum er so bundi› av fiskivinnuni, má hava gransking innan fiskivinnu. Tí:

• Vit mugu alla tí›ina fáa sum mest burturúr okkara fiskatilfeingi.

• Vit mugu alla tí›ina kenna tørvin hjá okkara kundum, solei›is at vit framlei›a tær vørurnar, sum geva teir bestu prísirnar til virki og samfelag

• Vit mugu framlei›a okkara vørur, solei›is at tær eru á einum jøvnum og høgum gó›skustø›i.

• Vit mugu framlei›a okkara vørur til kappingarførar prísir.

• Vit mugu alla tí›ina standa okkum í kappingini mótvegis okkara kappingarneytum

Í eini tí› har fría kappingin ræ›ur, har broytingarnar henda skjótari enn nakrantí›, er ta› sera umrá›andi altí› at vera kappingarførur mótvegis kappingarneytunum. Hetta krevur gransking!

Vit mugu sta›festa at ta› er sera líti› av fiskivinnugransking, i› fer fram í Føroyum sammett vi› onnur lond, sum t.d. Noreg og Ísland. Serstakliga líti› av hesi gransking hevur beinlei›is vinnuligan t‡dning.

Eitt sindur av gransking fer fram á Fiskirannsóknarstovuni og er mest sum bara lív – og vistfrø›islig gransking. Naka› av lívfrø›isligari gransking fer eisini fram á Biofar, men ta› hoyrist enn ikki um nógv úrslit hagani frá. Heilsufrø›isliga Starvsstovan hevur eisini veri› vi› í onkrum nor›urlendskum verkætlanum t.d. innan Listeria.

Felags fyri ta› sindri› av fiskivinnugransking, sum fer fram í Føroyum í dag, er, at ta› er sera líti› av hesi gransking sum gevur vinnulig árin.

Tann tøkniliga menning av fiskivinnu og alivinnu í Føroyum er fyri ta› mesta komin sum úrslit av gransking – men útlendskari gransking.

Føroyingar hava veri› rættiliga dugnaligir at brúka útlendsk granskingarúrslit fyri at menna fiski- og alivinnuna. Vandin vi› eini slíkari »kopiering« er, at tái› hendan er framd, hava kappingarneytarnir t.d. aftur tiki› a›ra tøkni í brúk ella framlei›slu.

Samstundis er nógv útlendsk vinnugransking vard, og úrslitini koma ikki fram fyrr enn rúm tí› er farin.

Hetta ger, at ta› er ney›ugt hjá føroyingum sjálvum at granska.

### Er førleiki innan fiskivinnugransking í Føroyum?

Føroyska samfelagi› hevur eitt vælútbúgvi› fólk. Rættiliga stórur partur av fólkinum nema sær hægri lestur uttanlands serliga í Danmark.

Um hugt ver›ur eftir, hvar tey høgt útbúnu fólkini enda eftir loki› prógv, er ta› serstakt fyri Føroyar, at tey flestu fáa starv í almenna sektorinum, me›an bert tey heilt fáu fáa sær starv í privatu vinnuni.

Hví hetta er so er ikki so lætt at grei›a frá, og er heldur ikki ætlanin vi› hesi grein.

Vit mugu bara sta›festa, at tann mesti heilakapasiteturin »Brainware« í samband vi› granskingarførleika í Føroyum er í almenna sektorinum.

Um mest tí skal fáast burturúr gransking í Føroyum sæ› út frá einum vinnuligum sjónarmi›i, er ta› ney›ugt vi› sera gó›um samstarvi ímillum almenna sektorin og ta› privata vinnulívi›. Hetta krevur vir›ing frá bá›um pørtum og ta› krevur ikki minst at møguleiki er fyri n‡ggjum samstarvsloysnum, sum ikki eru heftar av gomlum vana og sum ganga tvørtur um sektorar og (møguliga) eisini fakmørk.

Um ikki hetta letur seg gera eri eg bangin fyri at tann »Brainware« sum vit eiga í almenna sektorinum ver›ur til »Drainware«, av tí at tær fakligu avbjó›ingarnar ver›a ov lítlar og at vandi av tí sama er fyri at fólk sovna burtur ella stinga í sekkin, og finna sær avbjó›ingar a›rasta›ni enn í Føroyum.

Stór verklig vitan er ímillum fólk, sum dagliga starvast í tí føroysku fiski og alivinnuni. Fiskivinnan er so stórur partur av tí lokala samfelagnum og grípur inn í so stórar partar av dagliglívinum hjá føroya fólki, at sera gó›ur gró›rarbotnur er fyri mennandi tjaki um vi›urskifti, sum vi›víkja hesum vinnum.

Granskingar avbjó›ingin liggur tískil í at samskipa hesa vitan og seta hana saman vi› servitan á ymiskum økjum, fyri harvi› at fáa ítøkilig verklig úrslit burtur úr .

### Hvør fiskivinnugransking skal ver›a og hvussu kann hon skipast?

Undirrita›i er av tí avgjørdu ásko›an, at tann fiskivinnugransking, sum vit skula hava í Føroyum, skal ver›a vinnurætta› gransking.

Bæ›i ta› fíggjarliga og menniskansliga tilfeingi er avmarka›, og tí eigur orkan at ver›a løgd á gransking sum kemur vinnuni til gó›ar í mest møguligan mun.

Í dag fer fram ávís gransking innan fiskiídna› á Heilsufrø›isligu Starvsstovuni (HFS). Hetta ver›ur fíggja› vi›, at stu›ul ver›ur latin úr grunninum fyri praktiskar fiskiroyndir til verkaætlanir innan fiskiídna›in.

Verkaætlanirnar eru sera nógv bundnar at teimum fólkum, sum starvast á HFS og ikki so nógv at, hvat er mest gagnligt fyri vinnuna.

HFS er fyriskipa› solei›is, at undir stjóranum er fyrisitingardeild, fiskivinnudeild, sum mest fæst vi› eftirlit, umhvørvisdeild, umframt mikrobiologisk og kemisk starvsstova. »Granskingareindin« gongur uppá tvørs av á›urnevndu deildum.

Ta› hevur ljó›a› at landsst‡ri› ætlar at styrkja um granskingarpartin á Heilsufrø›isligu Starvsstovuni.

Ta› er gle›iligt, at landsst‡ri› vil styrkja granskingina í Føroyum vi› at játta pengar til endamáli›, men spurningurin er, um ta› er rætt at at styrkja fiskivinnugranskingina undir tí bygna›i, sum HFS hevur í dag.



Egil Olsen

Høvu›sorsøkin til at eg ivist í hesum er, at eg meti ta› ver›a óheppi› at t.d eftirlit vi› virkjum ver›ur gjørd í sama fyriskipanarliga bygna›i sum granskingin. Vandi er eisini fyri, at granskingin ver›ur gjørd vi› útgangsstø›i í persónum, sum arbei›a á HFS, og ikki ney›turviliga eftir tí tørvi, vinnan hevur.

Stø›a má tí takast til tann fyriskipanarliga bygna›in á HFS. Stovnurin kann hava sama bygna› sum nú, me›an granskingarparturin ver›ur lagdur uttanfyri stovnin, ella at eftirliti› ver›ur flutt úr stovninum og lagt saman vi› t.d. fiskivei›ieftirlitinum.

Granskingarverkaætlanir eiga at ver›a gjørdar í tøttum samstarvi vi› vinnuna og í mest møguligan mun úti á teimum virkjum, sum eru vi› í teimum einstøku verkætlaninum. Mínar lei›sluroyndir gjøgnum 10 ár, hava sannført meg um, at har granskarar og virki arbei›a tætt saman, fæst mest burturúr, tí tann praktiski førleikin, sum starvsfólkini hava frammanundan, hjálpir væl til at røkka gó›um verkligum úrslitum.

Vi› at vera úti á virkjunum fáa granskararnir eisini betri fatan av, hvat er mest átro›kandi og lønandi at granska.

Sjálvandi eigur ein at brúka t.d. tær tænastur, sum HFS veitir innan småverulívfrø›i og evnafrø›i og ta hollu vitan sum hesin stovnurin hevur bygt upp innan hesi økir. Eg dugi ikki at síggja, at ta› skal ver›a nakar trupulleiki at samskipa fiskivinnugranskingina uttanfyri HFS og samstundis hava møguleika at brúka tær tænastur, sum HFS hevur í dag.

Ein spurningur, sum sjálvandi skal svarast í sambandi vi› fiskivinnugransking, er, hvør skal gjalda.

Eg haldi at fiskivinnugranskingin eigur at ver›a fíggja› partvís vi› almennum pengum og partvís frá vinnuni sjálvari. Vinnan kundi t.d. lati› eitt ávíst gjald av útflutninginum og marka› ta› til gransking, menning og markna›arføring. At vinnan sjálv er vi› í fíggingini økir eisini um áhugan hjá vinnuni at fáa ítøkilig úrslit burturúr granskingini.

Hvussu nógv, hvør partur skal gjalda, má eisini síggjast í mun til, hvørjar verkætlanir talan er um, og hvussu avmarkandi tær eru.

At gransking kann geva úrslit var›, eg sannførdur um eftir vitjan á einum virki í Nor›ur Noreg herfyri.

Virki› virkar úrdráttir úr fiska- og alislógvi, og framleiddi hávir›isúrdráttir sum fiskal‡si til matvøruframlei›slu (functional foods), ensymir, kaviar, DNA-salt (ver›ur brúkt í kosmetikkídna›inum) og a›rar hávir›isúrdráttir.

Virki›, sum er eitt úrslit av mi›vísari vinnurætta›ari gransking, metir, at um fimm ár, kann vir›i› burturúr fiski og alislógvi hava eitt meirvir›i uppá 5 Nok. Kr umrokna› pr. kilo rávøru fisk.

Eg skal at enda koma vi› f‡ra dømum um áhugaverdar og eisin átro›kandi vinnurætta›ar granskingaruppgávur innan fiskivinnuna í Føroyum:

• Hvussu skulu vit bera okkum at fyri at ala longri til havs ? (tøkni, búskapur vm.)

• Tilgongd (rekruttering): Hvussu tryggja vit okkum stø›ugt og n‡tt starvsfólk til fiski og alivinnuna ?

• Betri gagn‡tsla av fiskatilfeinginum: Hvussu fáa vit lønandi virksemi burturúr tí rávøru sum í dag ikki kemur til lands, og hvussu fáa vit hækka› vir›i burturúr hjáframlei›slum

• Hvussu fáa vit endurn‡ggja› heimafiskiflotan, solei›is at hann ver›ur lønandi

Vón mín vi› hesi grein er at birta uppundir kjak um føroyska fiskivinnugransking. Granskingin er ney›ug longu ídag.

Granskingin ver›ur uppaftur ney›ugari í einum føroyskum sjálvberandi fiskivinnubúskapi.

*Vi› tøkk fyri upptøkuna*
***Egil Olsen***
***fiskivinnufrø›ingur***